# Trygdargrunnur Fiskivinnunnar

**Tinghúsvegur 14, Postboks 3025, FO-110 Tórshavn**

## Ársfrásøgn

## 2016

**AVRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á stýrisfundi, tann

_______________________________

Fundarstjóri

## Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 4 |
| Leiðslufrágreiðing | 5 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2016** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 9 |
| Rakstrarroknskapur | 12 |
| Fíggjarstøða | 13 |
| Notur | 14 |

## Leiðsluátekning

Stýrið og stjórnin hava í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2016 hjá Trygdargrunni Fiskivinnunnar.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2016 og av úrslitinum av virksemi felagsins fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2016.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri stýrisfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 16. mars 2017

**Stjórn**

Magni á Deild Olsen
stjóri

**Stýrið**

| | | |
|---|---|---|
| Alfred Petersen<br>stýrisformaður | Herálvur Joensen | Páll Hansen |
| Jógvan Jespersen | Jan Højgaard | Absalon í Buð |
| Annfinnur Garðalíð | | |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

### Til leiðslunaleiðsluna í Trygdargrunni Fiskivinnunnar

### Átekning á ársroknskapin

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Trygdargrunni Fiskivinnunnar fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2016 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini og løgtingslóg um Trygdargrunn Fiskivinnunnar.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av innanhýsis eftirlitinum, ið leiðslan metir skal til, fyri at ein ársroknskapur kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

### Ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðanini, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin. Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Hetta krevur, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í ársroknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørd verða tey grannskoðanararbeiði, sum skulu til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í ársroknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Í váðametingini hevur grannskoðarin innanhýsis eftirlitið í huga, ið skal til, fyri at grunnurin kann gera ein ársroknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at mett verður um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu ársroknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Niðurstøða**

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2016 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar - 31. desember 2016 samsvarandi ársroknskaparlógini og løgtingslóg um Trygdargrunn Fiskivinnunnar.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Vit hava, sambært ársroknskaparlógini, lisið leiðslufrágreiðingina. Vit hava ikki gjørt annað sum ískoyti til grannskoðanina av ársroknskapinum. Útfrá hesum grundarlagi er tað okkara fatan, at upplýsingarnar í leiðslufrágreiðingini eru í samsvari við ársroknskapin.

Tórshavn, tann 16. mars 2017

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Heini Thomsen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | |
|---|---|
| **Felagið** | Trygdargrunnur Fiskivinnunnar<br>Tinghúsvegur 14<br>Postboks 3025<br>FO-110 Tórshavn<br><br>Telefon: 353020<br>Telefaks: 353025<br>Heimasíða: www.trygdargrunnurin.fo<br><br>Sp/f-skrás.nr.:<br>Roknskaparár: 1. januar - 31. desember<br>6. roknskaparár |
| **Stýrið** | Alfred Petersen, stýrisformaður<br>Herálvur Joensen<br>Páll Hansen<br>Jógvan Jespersen<br>Jan Højgaard<br>Absalon í Buð<br>Annfinnur Garðalíð |
| **Stjórn** | Magni á Deild Olsen, stjóri |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar**<br>løggilt grannskoðanarvirki<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo |

## Leiðslufrágreiðing

**Virksemi**

Trygdargrunnur Fiskivinnunnar virkar eftir lógini um Trygdargrunn Fiskivinnunnar og hevur til endamáls at tryggja tí einstaka fiskimanninum inntøkutrygd. Umframt hetta umsitur grunnurin eisini millum annað sjúkratrygd til fiskimenn og stuðul til flutning av fiski. Harafturat hevur grunnurin eisini ymsar skrásetingaruppgávur um hendi.

**Gongdin í virksemi og fíggjarligum viðurskiftum**

Í 1947 samtykti løgtingið eina fyribilsskipan, ið umfataði eina minstulønarskipan og eina sjúkraviðbótarskipan. Trý ár seinni gjørdist skipanin varandi, og umfataði hendan tá eisini eina forskotsskipan.

Skipanin við inntøkutrygd, ið áður varð fyrisitingarliga skipað undir Lønjavningarstovuni, hevur síðani 1. januar 2011 verið umsitin og fíggjað av arbeiðsgevarunum og –takarunum í fiskivinnuni umvegis Trygdargrunn Fiskivinnunnar. Umframt hetta hevur grunnurin átikið sær ymsar aðrar fyrisitingarligar uppgávur, eitt nú sjúkratrygd til fiskimenn og flutningsstuðul.

Frá 1. januar 2017 at rokna verður fyrisitingin av sjúkratrygdini ikki longur hjá Trygdargrunninum.

Inntøkur grunsins stava í høvuðsheitum frá, at eigarar av fiskiførum, heimahoyrandi í Føroyum, ið hava loyvi til vinnuligan fiskiskap sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, rinda eitt gjald fyri allar avreiðingar. Hetta gjaldið er 1% av avreiðingarvirðinum. Harumframt hevur grunnurin eisini nakað av inntøkum í sambandi við fyrisitingarligar uppgávur.

Samlaðu inntøkurnar fyri árið 2016 eru 31,1 mió. kr., samanborið við 29,6 mió. kr. í 2015.

Fiski- og útróðrarmenn, heimahoyrandi í Føroyum, sum reka fiskifar ella mynstra við fiskifari, heimahoyrandi í Føroyum, kunnu fáa inntøkutrygd eftir nærri ásettum reglum. Henda trygd skal vera við til at tryggja fiski- og útróðrarmonnum inntøku í tíðarbilum, tá inntøkan frá fiskivinnu svíkur.

Samanlagt vórðu rindaðar 13,0 mió. kr. í inntøkutrygd í 2016. Samanborið við 2015, tá samlaða útgoldna inntøkutrygdin var 10,6 mió. kr., var talan um ein vøkstur á 2,4 mió. kr. svarandi til 22,6%.
Ein orsøk til, at meiri varð goldið út í inntøkutrygd í 2016 samanborið við 2015, er hon, at bæði minstalønin og minstiforvinningurin hækkaðu miðskeiðis í 2015 og aftur 1. juni 2016.

## Leiðslufrágreiðing

Talvan niðanfyri vísir, hvussu útgjøldini í árinum kunnu sundurgreinast:

| | 2016 | | 2015 | |
|---|---|---|---|---|
| | útgjald kr. | útgjald % | útgjald kr. | útgjald % |
| Bólkur 2 trolarar | 1.143.190 | 8,77% | 1.370.091 | 12,92% |
| Bólkur 3 línuskip | 4.656.281 | 35,70% | 3.290.858 | 31,03% |
| Bólkur 4a útróðrarb. | 966.382 | 7,41% | 530.025 | 5,00% |
| Bólkur 4b útróðrarb. | 1.496.962 | 11,48% | 1.120.387 | 10,56% |
| Bólkur 4t trolbátar | 243.132 | 1,86% | 69.353 | 0,65% |
| Bólkur 5 útróðrarbátar | 2.810.819 | 21,55% | 2.969.104 | 27,99% |
| Bólkur garnaskip | 1.109.358 | 8,51% | 935.678 | 8,82% |
| Bólkur langfaraskip | 0 | 0% | 307.998 | 2,90% |
| Bólkur uppsjóvarskip | 455.920 | 3,50% | 12.414 | 0,12% |
| Bólkur rækjuskip | 159.458 | 1,22% | 0 | 0,00% |
| | 13.041.502 | 100,00% | 10.605.907 | 100,00% |

Talvan niðanfyri vísir býtið millum minstaforvinning og minstuløn:

| | inntøkutrygd | minstaforvinning | mfv % | minstaløn | ml% |
|---|---|---|---|---|---|
| 2011 | 10.262.631 | 3.808.141 | 37,1% | 6.454.490 | 62,9% |
| 2012 | 11.104.122 | 3.697.711 | 33,3% | 7.406.411 | 66,7% |
| 2013 | 13.578.209 | 3.882.609 | 28,6% | 9.695.600 | 71,4% |
| 2014 | 10.962.432 | 4.255.936 | 38,8% | 6.706.496 | 61,2% |
| 2015 | 10.605.907 | 4.852.371 | 45,8% | 5.753.536 | 54,2% |
| 2016 | 13.041.502 | 5.271.512 | 40,4% | 7.769.990 | 59,6% |

Upphæddin, ið varð goldin í minstaforvinningi í 2016 var hin størsta, síðani grunnurin varð stovnaður aftur í 2011. Minstalønin í 2016 var á leið hon, sum í miðal hevur verið goldin hesi seinastu seks árini.

### Úrslit og eginogn

Rakstrarroknskapurin fyri tíðina frá 1. januar 2016 til 31. desember 2016 vísir eitt avlop uppá kr. 16.433.414 samanborið við kr. 13.961.675 fyri sama tíðarskeið í 2015.

Við árslok hevði grunnurin íløgur fyri 118,8 mió. kr. í virðisbrøv, og eginognin var kr. 123,1 mió. kr. Eitt ár frammanundan var eginognin 106,7 mió. kr.

### Hendingar eftir roknskaparlok

Frá roknskaparlok til í dag er einki hent, sum hevur týðandi ávirkan á ársroknskapin.

## Leiðslufrágreiðing

### Ávirkan av gongdini í avreiðingarvirðinum

Inntøkurnar hava støði í avreiðingarvirðinum hjá viðkomandi fiskiførum. Hetta kann sveiggja frá einum ári til annað, men seinastu fýra árini hevur tað verið ein støðugur vøkstur í samlaða avreiðingarvirðinum, sum í 2016 fór upp á 3,0 mia. kr. Samanborið við 2015 var talan um ein vøkstur á sløk 6%.

**Avreiðingarvirði 2006 – 2016**

| | |
|---|---|
| 2006 | 2.435.287.447 |
| 2007 | 2.418.265.499 |
| 2008 | 1.820.820.497 |
| 2009 | 1.621.702.095 |
| 2010 | 2.057.481.404 |
| 2011 | 2.346.416.638 |
| 2012 | 2.334.490.888 |
| 2013 | 2.399.769.490 |
| 2014 | 2.534.783.816 |
| 2015 | 3.014.808.456 |
| 2016 | 3.046.523.265 |

Við at sundurgreina útgjøldini fyri 2016 í skipabólkar sæst, at línuskip í bólki 3, hóast munandi lækking samanborið við 2013, framvegis umboða størsta partin av inntøkutrygdini, nevniliga 35,7%. Upphæddin er 1.365 t.kr. – sløk 41,5% - hægri enn í 2015. Í 2013 umboðaði inntøkutrygdin hjá manningunum á stállínuskipunum 40% av samlaðu inntøkutrygdini, og í 2011 var hon 48,1% av samlaðu inntøkutrygdini.

Næststørsti bólkurin er útróðrarbátar í bólki 5, sum tó er lækkaður úr 28,0% í 2015 til 21,6% í 2016.

Í 2015 vórðu viðurskiftini hjá útróðrarbátunum í bólki 5 broytt við m.a. at seta ein botnfrádrátt í skipanina, og er tað ein av orsøkunum til, at útgjaldið av minstaforvinningi øktist í 2016. Samanumtikið vórðu sløk 57,3% av samlaðu inntøkutrygdini í 2016 goldin hesum báðum skipabólkunum. Bert smávegis broytingar hava verið innan hinar skipabólkarnar lutfalsliga í mun til 2015.

## Leiðslufrágreiðing

**Kunningartøkni**
Í 2014 fór verkætlan hjá Trygdargrunninum av bakkastokki, sum snýr seg um at endurnýggja kt-undirstøðukervið hjá grunninum. Kt-skipanirnar hjá grunninum vóru gamlar og ótíðarhóskandi, og í 2014 fór grunnurin tí undir at endurnýggja alt kt-undirstøðukervið. Nú stívliga tvey ár seinni, er arbeiðið komið so væl áleiðis, at nýggja skipanin er tikin í nýtslu, og royndirnar eru góðar.

Nú eru bert tvey menningarstig eftir at gera. Annað er ein sjálvgreiðsla, so viðskiftafólkini í størri mun sjálvi kunnu avgreiða síni ørindi hjá grunninum. Hitt er ein hagtalsskipan, har tað fer at bera til at finna alskyns hagtøl um føroysku fiskivinnuna.

Eftir ætlan verða hesi menningararbeiði liðug komandi ár.

Nýggja kt-skipanin hevur gjørt arbeiðið hjá grunninum munandi lættari, skjótari og tryggari, og við nýggju skipanini eru lunnar lagdir undir munandi betri møguleikar fyri meiri sjálvgreiðslu og betri hagtølum.

**Framtíðin**
Stýrið fyri grunnin metir, at Trygdargrunnurin nú er so mikið væl fyri fíggjarliga, at tað er ráðiligt at seta lógarásetta trygdargjaldið niður úr 1% til 0,6% av brutto avreiðingarvirðinum. Broytingin fer væntandi at merkja, at samlaðu inngjøldini til grunnin í 2017 fara at verða á leið 10 mió. kr. lægri enn undanfarna ár.

Væntandi fer raksturin hjá grunninum hóast broytingina at geva eitt avmarkað avlop.

Eginognin hjá grunninum, sum við árslok 2016 var 122,6 mió. kr. svarar til 9,4 ferðir samlaða útgjaldið í 2016, og tað metir stýrið fyri grunnin fyribils vera hóskandi trygt.

Broytingin hevur virknað frá 1. januar 2017.

Vanliga ásetir stýrið inntøkutrygdina eina ferð um árið við virknaði frá 1. januar.

Stýrið fyri Trygdargrunnin samtykti í 2012 at slaka í treytunum fyri kravda avreiðingarvirðið hjá útróðarmonnum. Treytin fyri at vera partur av skipanini við minstaforvinningi er, at avreiðingarvirðið fyri hvønn mann umborð á bátinum er í minsta lagi 120 t.kr. seinastu seks mánaðirnar. Hetta mark var frammanundan 200 t.kr.

Galdandi frá 1. juni 2016 eru reglurnar broyttar soleiðis, at kravda avreiðingarvirðið nú er 240 t.kr um árið fyri hvønn tilmeldaðan persón umborð á bátinum og í minsta lagi 25 t.kr. fyri hvønn persón seinastu tríggjar mánaðirnar.

Hóast stýrið gjørdi av, at kravda avreiðingarvirðið á 240 t.kr. fyribils skuldi vera galdandi til og við 31. mai 2016, er nú gjørt av, at kravda avreiðingarvirðið fyribils heldur fram óbroytt alt 2017.

Stýrið samtykti eisini í 2015, at minstalønin skuldi vera kr. 1.000 um dagin og minstiforvinningurin 18 t.kr. um mánaðin fram til 1. juni 2016. Eftir henda dagin er minstalønin hækkað upp á kr. 1.050 um dagn, og minstiforvinningurin hækkaður upp í kr. 18.500 um mánaðin.

## Leiðslufrágreiðing

Botnfrádrátturin, sum frammanundan var kr. 2.000 fyri hvønn mannin pr. túr, varð broyttur 1. juni 2016 til nú at vera ymiskur alt eftir, um fiskað verður við línu ella øðrum reiðskapi. Botnfrádrátturin er nú skipaður soleiðis, at sum felagsfrádráttur av avreiðingarvirðinum, verður loyvdur ein botnfrádráttur fyri hvønn tilmeldaðan persón hvønn túr uppá í mesta lagi kr. 3.000 við línu og kr. 1.500 við øðrum reiðskapi, tó ikki hægri enn avreiðingarvirðið hvønn túr sær. Av nettovirðinum eigur manningin 45% til javnbýtis.

Skipanin, sum frá 1. januar 2011 hevur verið skipað undir Trygdargrunni Fiskivinnunnar, hevur sostatt verið við at tryggja fiskimonnum betri inntøkutrygd hesi árini, grunnurin hevur virkað. Vøksturin seinastu fýra árini í minstuløn og minstaforvinningi hevur verið 50% og stívliga tað. Minstalønin er hækkað við 50% úr kr. 700 upp í kr. 1.050 um dagin, og minstiforvinningurin er hækkaður við 54% - úr kr. 12.000 upp í kr. 18.500 um mánaðin.

Tað, at trygdargjaldið er lækkað úr einum prosenti niður í 0,6 prosent merkir, at samlaðu inngjøldini til grunnin minkað samsvarandi.

Hinvegin eru kvoturnar á uppsjóvarfiski munandi hægri í 2017 samanborið við 2016, og tí verður roknað við, at samlaðu inntøkurnar hjá grunninum kortini ikki minka heilt so nógv, sum broytingarnar í trygdargjaldinum bera boð um.

Tað verður roknað við, at útgjøldini av inntøkutrygd aftur í 2017 fara at kvinka uppeftir og verða nakað størri í 2017 samanborið við 2016. Hetta er serliga tí, at broytingarnar í útgjaldsviðurskiftunum, sum vóru gjørdar í 2016, nú fara at fáa virknað í eitt heilt ár.

Samlaðu rakstrarkostnaðirnir verða væntandi nakað hægri í 2017 samanborið við undanfarna ár. Orsøkin er serliga hon, at upphæddin, ið verður brúkt til at menna kt-skipanina lidna, er nakað hægri enn í 2016.

Samlaða ársúrslitið fyri 2017 verður væntandi eitt avmarkað avlop.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Trygdargrunn Fiskivinnunnar er gjørdur í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum.

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Alment um innrokning og virðisáseting

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva grunninum fíggjarligar fyrimunir, og virðið av ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr grunninum, og virðið av skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapurin

### Inntøkur

Inntøkur við støði í avreiðingum verða tiknar við í rakstrarroknskapin, um avreiðing er farin fram.

### Útgjøld

Útgjøldini eru tíðargreinað soleiðis, at tey útgjøld, ið ikki eru útgoldin áðrenn 31. desember, men sum hoyra heima í roknskaparárinum, eru tikin við sum skyldug inntøkutrygd og verða upptikin sum skuld í fíggjarstøðuni ultimo í roknskaparárinum.

### Aðrar rakstrarinntøkur

Aðrar rakstrarinntøkur fevnir um postar í roknskapinum, sum ikki hava beinleiðis samband við høvuðsvirksemið hjá grunninum.

## Nýttur roknskaparháttur

### Aðrir uttanhýsis kostnaðir

Her er talan um kostnað í samband við útbreiðslu, umsiting, hølir og tap av ágóða.

### Starvsfólkakostnaðir

Starvsfólkakostnaðir umfata løn íroknað frítíðarløn og eftirløn umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

### Fíggjarpostar

Fíggjarligir postar umfata rentuinntøkur og -kostnaðir umframt staðfestan og óstaðfestan kursvinning og -tap viðvíkjandi fíggjarligum ognum og skyldum. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

### Skattur av ársins úrsliti

Trygdargrunnur Fiskivinnunnar er undantikin skattskyldu.
Posturin umfatar meirvirðisgjald, ið stavar frá keypið av vørum og tænastum.

## Fíggjarstøðan

### Áogn

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

### Virðisbrøv og kapitalpartar

Virðisbrøv og kapitalpartar, ið eru innroknað sum ogn í umferð, verða virðisásett til dagsvirði (virðisbrævamarknaðarkurs) við roknskaparlok.

### Tøkur peningur

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

### Skuld

Skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2016 kr. | 2015 t.kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 31.071.241 | 29.594 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 395.000 | 395 |
| | Útgjaldingar av inntøkutrygd | -13.041.501 | -10.605 |
| | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -2.446.586 | -1.976 |
| | **Bruttoúrslit** | **15.978.154** | **17.408** |
| 2 | Starvsfólkakostnaðir | -2.432.037 | -2.231 |
| | **Rakstrarúrslit** | **13.546.117** | **15.177** |
| | Fíggjarpostar | 3.181.739 | -1.034 |
| | **Úrslit áðrenn skatt og avgjøld** | **16.727.856** | **14.143** |
| | Skattur og avgjøld | -294.442 | -181 |
| | **Ársúrslit** | **16.433.414** | **13.962** |
| | **Uppskot til býti av ársúrsliti:** | | |
| | Flutt úrslit | 16.433.414 | 13.962 |
| | **Býtt tilsamans** | **16.433.414** | **13.962** |

## Fíggjarstøða 31. desember

| Nota | OGN | 2016 kr. | 2015 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Útistandandi avreiðingargjald | 1.569.093 | 4.566 |
| | Áogn tilsamans | 1.569.093 | 4.566 |
| | Virðisbrøv | 118.817.232 | 101.638 |
| | Virðisbrøv tilsamans | 118.817.232 | 101.638 |
| | Tøkur peningur | 3.521.779 | 1.320 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **123.908.104** | **107.524** |
| | **OGN TILSAMANS** | **123.908.104** | **107.524** |
| | **SKYLDUR** | | |
| | **Eginogn** | | |
| 3 | Stovnsfæ | 51.363.158 | 51.363 |
| 4 | Flutt úrslit | 71.762.333 | 55.329 |
| | **Eginogn tilsamans** | **123.125.491** | **106.692** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 15.076 | 27 |
| | Onnur skuld | 767.537 | 805 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 782.613 | 832 |
| | **Skuld tilsamans** | **782.613** | **832** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **123.908.104** | **107.524** |

**5 Veðsetingar og trygdarveitingar**

**6 Eventualpostar**

## Notur

| | | 2016<br>kr. | 2015<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Inntøkur** | | |
| | Gjald fyri avreiðing | 31.071.241 | 29.594 |
| | | **31.071.241** | **29.594** |
| **2.** | **Starvsfólkakostnaðir** | | |
| | Lønir | 1.621.670 | 1.564 |
| | Eftirlønir | 181.378 | 180 |
| | Arbeiðsmarknaðargjøld | 72.342 | 61 |
| | Keyp av arbeiðsmegi v.m. | 556.647 | 426 |
| | | **2.432.037** | **2.231** |
| | Stýrið | 378.270 | 378 |
| | Starvsfólk í miðal | 4 | 4 |
| **3.** | **Stovnsfæ** | | |
| | Stovnsfæ við ársbyrjan | 51.363.158 | 51.363 |
| | | **51.363.158** | **51.363** |
| **4.** | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit primo | 55.328.919 | 41.367 |
| | Flutt úrslit | 16.433.414 | 13.962 |
| | | **71.762.333** | **55.329** |

## 5. Veðsetingar og trygdarveitingar

Ognirnar hjá grunninum eru ikki veðsettar.
Tað áhvílir ikki grunninum aðrar møguligar skyldur so sum ábyrgdir, vekslar v.m

## 6. Eventualpostar

### Sáttmálabundnar skyldur

Trygdargrunnur Fiskivinnunnar hevur umsitingaravtalu við Arbeiðsloysisskipanina.